# Bjarni hevði ikki væntað annað

**- Tjóðveldisflokkurin vil bara halda grýtuni í kók, tí vilja tey nú hava fleiri kanningar av mær sigur Bjarni Djurhom, landsstýrismaður**

DJURHOLM-KANNINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bjarni Djurholm sigur, at tað er politikkur og eftirrationaliseringar, tá ið Tjóðveldisflokkurin nú vil hava hann kannnaðan einaferð afturat*

Tá ið Bjarni Djurholm uppundir vikuskiftið varð fríkendur í kanningini, sum løgmaður setti í verk av leikluti hansara mótvegis Framtaksgrunninum, kemur tað ikki óvart á høvuðspersónin sjálvan.

– Hatta var tað eg hevði væntað, tí eg var alla tíðina sannførdur um, at har var onki at koma eftir, sigur hann.

Hann sigur sostatt at hann er nøgdur við kanningina og hann hevur fult álit á kanningini. Og á ein hátt skilir hann ikki, at politikarar úr andstøðuni sáa iva um útslitið.

– Løgmaður hevur brúkt tey amboð, sum Løgtingiðð hevur givið honum at brúka og tí er tað løgið, at sama Løgting nú sáar iva um úrslitið.

Men hinvegin undrar tað ikki Bjarna Djurholm, at andstøðan sáar iva um kanningina.

– Tað var ikki annað væntandi. Hetta er politikkur og andstøðan ger, hvat hon kann, fyri at halda grýtuni í kók.

Men hann heldur kortini ikki, at tað er heilt sakligt.

– Tað tíðarskeiðið, sum Tjóðveldisflokkurin nú vil hava kannað, er tað tíðarskeiðið, har eg sat í samgongu við Tjóðveldisflokkurin. Tá setti tjóðveldisflokkurin nærgangandi spurningar í Løgtinginum og tað varð avgreitt í løgtinginum og meiri hoyrdist ikki.

– Ongin hevur havt hesar viðmerkingar, fyrrenn nú Tjóðveldisflokkurin er í andstøðu og tí kann hetta ikki takast sum annað enn eftir-rationaliseringar.

– Tað er løgið, at tað skal vera so umráðandi hjá Tjóðveldisflokkinum at seta kanningar í verk, tá ið teir onki gjørdi ta tíðina, teir sótu í samgonguni.

Annars hevur Bjarni Djurholm ongar viðmerkingar til, at Tjóðveldisflokkurin nú ætlar at fáa Landsstýrismálanevndina at kanna málið.

– Løgtingið ger, sum Løgtingið vil.

Men í sambandi við Framtaksgrunnin, hevur eisini ein annar spurningur tikið seg upp og tað er spurningurin um leiklutin hjá nevndini fyri Framtaksgrunnin.

Tað hevur verið framm, at Framtaksgrunnurin fekk ikki meiri enn gott helmingin fyri Fiskavirking og Fiskasøluna, sum hann kundi fingið, tók hann av tilboðum hann áður fekk upp á fyritøkurnar.

Tí hava røddir verið frammi um at biðja Selskabsstyrelsen kanna embætisførsluna hjá nevndini fyri Framtaksgrunnin við atliti til, at grunnurin kanska hevur søplað eina stóram milliónaupphæðd burtur.

– Tað havi eg onga viðmerking til, sigur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður.

## Ongi skip byggjast næsta ár

**Nýtt skip verður ikki bygt til Nólsoyarsiglingina næsta ár**

Tað er ikki ætlanin at byggja nýtt skip til Strandferðsluna næsta ár.

Tað stendur í uppskotinum til fíggjarlóg, sum Landsstýrið hevur lagt fram.

Landsstýrið ásannar, at sámu skipini hjá Strandferðsluni eru gomul og tí er neyðugt at summi fáa umfatandi umvælingar, men tað er eisini neyðugt at byggja nýggj skip fyri at nøkta flutningstørvin og fyri at lúka krøv frá Skipaeftirlitinum og klassanum.

Men tað verður ikki næsta ár, at skip verða bygd

Men hetta er ein partur av langtíðarætlanunum sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður. Hann sigur, at næsta ár fer Strandferðslan í holt við forkanningar, projekteringar og at fyrireika útbjóðingartilfar til tvey systurskip, eitt til Nólsoyarleiðina og eitt til Kalsoyarleiðina. Tilsamans verður ein millión sett av til endamálið.

**-Àki-**

## Suðuroyingar missa Smyril í fleiri vikur

Næsta ár skal Smyril í dokk í ein til tveir mánaðir

Næsta ár fara suðuroyingar at missa Smyril í fleiri vikur.

Orsøkin er, at í september skal hann uttanlands í dokk og tað fer at taka ein ella tveir mánaðir.

Tað er ymiskt eftirlit hann skal til og hann skal eisini hava ymsar ábøtur, sum eru umfataðar av teimum skyldum, sum skipasmiðjan hevur, altso garantieftirlit.

Jacob Vestergaard sigur, at samgongan hevur sett pening av til at leiga eitt hóskandi skip fyri.

# Suðuroyingar, nólsoyingar og kalsoyingar fáa betri samband

**Skipini hjá Strandferðsluni skulu sigla fleiri túrar til Suðuroyar Nólsoyar og Kalsoyar**

STRANDFERÐSLA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Nólsoyingar fáa 15 túrar um fjørðin afturat um vikuna næsta ár. Eisini Kalsoyingar og suðuroyingar fáa fleiri túrar*

Skipini hjá Strandferðsluni skulu sigla meiri komandi ár.

Tað ætlar samgongan.

Í hesum sambandi hevur samgongan sett 8,4 milliónir av, sum eru markaðar til meiri sigling til Suðuroyar, Nólsoyar og Kalsoyar.

Hetta er ein liður í at knýta útjaðaranin tættari upp í miðstaðarøkið, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum.

– Nú Norðoyatunnilin er latin upp, er nógv størsti parturin av fólkinum knýttur upp í miðstaðarøkið, og tí er tað umráðandi eisini at geva hinum borgarunum í landinum javnbjóðis møguleikar í tann mun, tað kann lata seg gera.

Hann sigur í hesum sambandi, at næsta ár ferð Smyril at sigla tríggjar túrar afturat um vikuna ímillum Suðuroynna og Havnina.

– Hesir túrarnir verða í ein ávísan mun lagdir í vikuskiftinum, tá ið mest fólk siglur.

Men hann leggur afturat, at tað er ikki vist, at játtanin røkkur til at Smyril siglur tríggjar túrar afturat um vikuna alt árið.

– Tí verður játtanin lagað soleiðis, at Smyril ikki fer undir hesar tríggjar eykatúrarnar fyrrenn út á árið, so at hann kann halda fram við trimum túrum afturat um vikuna uttan slit í alt 2008.

Annars sigur landsstýrið, at Smyril kostar umleið 11,7 milliónir krómur meiri at reka, enn mett var.

– Høvuðsorsøkirnar til hesa stóru hækking eru bæði tað, at oljan er dýrkað nógv og at hann brúkar meiri olju enn mett. Somuleiðis hevur hann kravt størri manning enn roknað varð við.

Tað hevur leingi verið eitt ynski úr Nólsoy og úr Kalsoy, at tey fáa fleiri túrar afturat um kvøldarnar og um vikuskiftini.

Og tað verður næsta ár, at hetta ynski verður uppfylt. Í hesum sambandi er ætlanin, at skipini hjá Strandferðsluni skulu sigla fleiri túrar afturat um kvøldið til Nólsoyar og Kalsoyar. Nólsoyingar 15 túrar afturat um vikuna og Kalsoyingar fáa eisini fleiri túrar afturat, men akkurát hvussu nógvar, eydnaðist ikki at fáa upplýst.

Annrs verður víst á, at stór óvissa er altíð um oljuprísirnar og tí er altíð ein ávísur váði við fíggjarlógini. Í fíggjarlógini er ikki lagt upp fyri møguligum hækkingum, men hækkar prísurin á tungog gassolju 1 krónu fyri liturin, kann gerast talan um eina eykaútreiðslur upp á 10 millónir krónur.